# 8. mars 1978

Altjóða kvinnudagurin varð mikudagin hildin í ymiskum londum, nakað harðliga ymsastaðni, vísti Útvarpið at siga frá. Í Havn legði politiið sína lætu uppi, tá Kvinnufylkingin skipaði fyri einari gonguteigagongu í miðbýnum við ti endamáli at tarna bilferðsluni. Hetta varð gjørt á tann hátt, at kvinnur við barnavognum og súkklum — og menn gingu tvørtur um vegin í ein stívan hálvan tíma, frá kl. fimm, júst tá ferðslan er hin mesta.

Kvinnurnar siga, at tær við hesum tiltaki vildu vísa á trupulleikarnar hjá gongufólki, børnum, gomlum, foreldrum við barnavognum og hjá fólki í koyristólum at ferðast í býnum. Ein kanning vísir, at uml. 800 bilar koyra um Vaglið tann hálva timan 16.45 – 17.15.

Í sambandi við mótmælið hevur Kvinnufylkingin sett fram nøkur krav:
færri privatar bilar — skollektivas ferðslu — gongubreytir fram við øllum vegum — lægri jaðarar við sliskum — onga parkering á ella við gongubreytir — kavarudding á og fram við gongubreytunum — åvaringaskelti — gonguteigar — stik fram við vandamiklum gøruhornum — at nýtt verður skil, í hvussu er, tá almennir bygningar verða bygdir, so bæði sjúk og brekað kunna nýta teir — trygga og góða barnaansing — spæliplass

Tað er uppgávan hjá ti almenna at loysa hesar spurningar. Men teir verða tó lítið virdir, tá onki verður gjørt fyri at loysa teir. Ti gera vit alik tiltøk, sigur Kvinnufylkingin.

Nr. 18 — 8. mars 1978 sosialurin

8. mars ALHEIMSKVINNUDAGU

## Vit mugu hava longri barsilsorlov!

Tá ein tosar við fólk um tað, at konufólk arbeiða úti, fellur tosið ofta inn á børnini, serliga tey smáu, sum skulu á vøggustovu, og so barsilsorlov.

Vøggustovurnar seta 3 mánaðir sum mark, og barnið kann ið hvussu er ikki vera yngri enn so, tá tað fer á vøggustovu. Helst skuldi markið verið einar 5—6 mánaðir, og uppaftur betri var, um mamman ella pápin slapp at vera heima hjá barninum, til tað var ársgamalt, tey kundu kanska skiftst um tað.

Men hvussu samsvarar hetta nú við longdina á barsilsorlovi?

Tímaløntar kvinnur fáa als ikki barsilsorlov. S&K sáttmálin tryggjar 3 mánaðar barsilsorlov, 1 mánað undan og 2 eftir føðing. Tær, sum arbeiða í handli og á skrivstovu o.t., har einki S&K felag er, hava í minsta lagi rætt til 2 mánaðir. Einasta barsilsorlov, sum yvirhøvur kann góðtakast, er tað, Starvsmannafelagið tryggjar limum sínum: 14 vikur við fullari løn, umframt, um ein vil, 6 vikur uttan løn.

Tá Jákup Lindenskov tosaði í útvarpinum um dagpeningaskipanina, segði hann, so vitt eg minnist, okkurt um, at barsilsorlov hjá tímalønt-um skuldi minna um tað hjá Starvsmannafelagnum. Vónandi verður tað so, tí annars líkist tað ongum.

Og enn sær tað út til, at børn í Føroyum bara hava eitt foreldur. Enn eru summi fólk so tápulig, at tey flenna, tá tosað verður um barsilsorlov til menn. Sjálvandi skulu páparnir eisini hava barsilsorlov, at byrja við 14 døgum hevði verið passaligt.

Alexandra

★ ★ ★

## SAMANHALD GEVUR STYRKI



## EG MEINI TAÐ

# Frælsi at keypa paraben-krem

*Katrin Petersen*

Hví er tað, at mann fær høvuðpínu av at keypa andlitskrem?

Ja, tað fekk eg, seinasta leygardag klokkan tvey.

Svarið finst í tí, at eg royndi at keypa eitt krem, sum ikki hevði hormonskaðilig evni í sær. Orðið "methylparaben" var dagsins illbøn.

Eftir ein hálvan tíma eydnaðist tað mær at finna eina krukku frá fyritøkuni Dr. Schiller, sum sá út til ikki at hava skaðilig evni í. Tá vóru millum onnur Garnier, BodyShop og Matas vrakað.

Og tá eg aftaná tosaði við vinkonu mína, sum hevði sagt mær um hetta evnið "methylparaben", sum eg skuldi lata vera við at keypa - so vísti tað seg, at hon meinti BUtylparaben - ikki MEthylparaben. (Ja, hvussu býtt kann man vera, ha.. ikki at kenna mun á butylparabeni og methylparabeni?)

Tá varnaðist eg høvuðpínuna. Sum ivaleyst kom av at lesa so nógvar smáttskrivaðar vørulýsingar.

Og bleiv ill. Óð inn á kemiskpolitiska hugburðin, at "brúkarin skal hava ein kjans at velja aðrar vørur enn tær umhvørvis- og heilsuskaðiligu".

Hví skal EG ganga sum ein annar verkfrøðingur og leita eftir eituevnum? Eg áni ikki hvat paraben er gott fyri. Eg kenni ongan sum sigur, "eg keypi altið krem við parabenum í, tí tað dámar mær betur" . Ongin velur hormonskaðilig evni við vilja. Vit vita bara ikki, hvat av øllum hesum glyceryl-, stearat-, propylen-svansinum er vandamikið ella vandaleyst. Hevði tað so av illum itið "hormonskaða-yl paraben". So hevði mann havt ein kjans.

Men tey, sum framleiða alt hetta evnafrøðiliga, tey hava verið snild. Lat brúkaran um at avgera, hvat hann vil keypa - og lat okkum fáa frið at framleiða og marknaðarføra sum vit altíð hava gjørt. Og so gera politikararnir tað. (NEI - eg tosi ikki um teir føroysku! Hví skuldu teir viðgjørt nakað so ótunnilsligt sum andlitskrem? Eg tosi sjálvandi um teir í Danmark og ES og har um leiðir). Og tá vit brúkarar so fara til handils, so kunnu vit skriva okkum ein innkeypslista við notum, okkurt soleiðis:.

Súrepli - donsk, hava minni innihald av eitrandi haldevni
Gummistivlar til lítla - uttan phtalatir
Tannkrem - uttan umhvørvisskaðiligt triclosan
Toskafløk - endiliga ikki úr Eystursjónum

Tí vit skulu jú sjálvi velja. Brúkarin hevur maktina, verður sagt. Um nóg nógv okkara krevja og keypa eiturleysar vørur, so hvørva tær við eitri í. Men veruleikin er, at vit hava hvørki vitan ella møguleika at velja. Henda dagin ætlaði eg umframt kremið at keypa ein varrablýant. Hvar er pláss fyri eini vørulýsing á einum varrablýanti?? Eg kundi sjálvandi farið til diskin og forlangað at vita, hvussu stóð til við hormonskaðiligu evnunum í blýantinum.

Men eg havi jú als ikki hug at velja varralit eftir prosentinnihaldinum av evnafrøðiligum vandamálum. Eg vil sleppa at velja eftir liti!

Las eina samrøðu í blaðnum hjá Keypssamtøkuni, Samvirke. Har segði ein maður, at sviar ætla, at brúkarin eisini skal loysa trupulleikan av niðurpíndum fiskastovnum í Eystursjónum. Tá fiskurin kemur í handilin, skal hann merkjast, so fólk kunnu lata vera at keypa hann - ja, um tey halda tað hevur nakað at siga, at fiskastovnurin er hóttur. Brúkaramakt, ikki so?

Í hesi greinini var spurt - hví skulu vit ein og ein taka støðu til alt hetta? Vit kundu eins væl tikið eina støðu saman.

Eg eri samd við hesum mannnum. Vit taka jú støðu saman, tá spurningurin er, um vit skulu hava fleiri barnagarðar ella loysa frá Danmark. Nevniliga við at atkvøða sum borgarar í einum demokratii.

Um ein fólkaatkvøða spurdi "Vilja vit hava evni, sum skaða hormonini so smádreingir kunnu fáa kvinnubróst og annars vera minni fertilir?" - høvdu tað verið ógvuliga fá, sum høvdu sagt ja. Kanska tey, sum framleiða øll - yl´ini og - pylen´ini.

Ongin politikari verður valdur á ting einans við atkvøðum frá eigarum av evnafrøðiligum verksmiðjum. So - haldið uppat at billa okkum inn, at vit hava maktina, vit sum drøna runt í SMS tíggju minuttir í tvey leygardag. Og sleppið okkum undan at ilskast inn á handilskonur, sum heldur ikki vita, hvat munurin á methyl- og butylparabeni er. Tær vilja eisini heldur selja varralitir eftir liti! Um vandamiklu evnini vóru bannað - SO mundu tey horvið.

PS: sjálvt um methylparaben ikki er líka skaðiligt sum butylsystirin, so eigur innihaldið bert at vera 0,4 prosent av samlaðu vektini. Og um fleiri sløg av parabenum eru í, so skulu tey tilsamans vera undir 0,8 prosent av innihaldinum. So. Nú lætti eg um hjá tær at keypa krem, ha?

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turid Kjølbro



# At umboða ruðuleikan

– Royggj. Tóroddur enn einaferð





*Yrkingasavnið Royggj, sum kom út í fjør*

*Tóroddur Poulsen, skald*

UMMÆLI
*Kim Simonsen*

Nýggja yrkingasavnið hjá Tóroddi er sum vant fylt við einum serligum tóroddskum speisemi, mangan stuttligt, men enn sum fyrr er nógv tvætl, møsn, humbukk og løgnar formleysar og høpisleysar yrkingar.

Tað er ójavnt, hvussu mett verður um Tórodd Poulsen sum yrkjara. Í Danmark fær hann misjøvn ummæli. Á Weekendavisen situr illa dámdi Lars Bukdal sum ummælari, og honum dámar eina best fragmentir, smáar reflektiónir og tvætlørindi fyri vaksin. Sjálvandi dámar honum Tórodd og skrivingarlag hansara. Ein annar ummælari, bókmentafrøðingurin Niels Lyngsø kallaði í Politiken Tóroddi fyri: "Lyseslukker" og helt, at bókin *Blóðroyndir* var merkt av eini : *"vrængende og demonstrativt ugidelig attitude"* (Politiken 3 marts 2003). Lyngsø helt, at Tóroddur forðaði fyri egnum talenti, og var ein yrkjari við lítlum y. Hann helt at enda, at: *"De gode vers, der vitterlig er der, forsvinder i en masse ligegyldigheder og næserynkerier".* Munurin á Lyngsø og Bukdal er ikki minni enn 100 prosent tilbiðan til heitið: "Lyseslukker" (við stóra L). Hetta seinasta er júst hvat eg sjálvur havi fört fram í eini greinarað um føroyska yrking her í heyst. Eftir at hava lisið savnið *Royggj*, havi eg sum so ikki broytt meining. Hinvegin skal tað sigast, at eg haldi Tórodd mangan vera so deiliga surrealistiska stuttligur, sjálvt tá hann er banalur og hevur lítið uppá seg, at tað er ómøguligt ikki at elska hann fyri júst hetta: *"tey skilja ikki Nólsoynna/ ella at mínir nýggju skógvar kunnu floyta/tá teir vera vátir". "Tey skilja ikki/ at mánin er brúnur/og at hann kann spegla ta løtuna/tá ein ljósareyður veðrur av Vatnsoyrum/rennur um vegin."*

### Banalar yrkingar

Tóroddur yrkir um endurkomandi evni, mest eru hesar "yrkingar" banalar observatiónir: *"Súkklurnar stýrast/amen av himni. Eingin/eygleiðir hetta."* og *"Fuglurin kennir/sólbrillur tínar aftur/og etur molan".* Men av og á brestur fyri nevi hjá Tóroddi, og hann loypur út í heimin í andarisi og sigur okkurt, um ikki vakurt orðað, so áhugavert: *"Í kvøld rennur trúgvin undan/ teimum gudleysu stjørnunum/ og finnur ikki heim / fyrr enn streymurin fer"* og *"Mest av øllum/ ræddist hann/ longsilin eftir/ at ongantið aftur/ leingjast aftur heim (...)"* Her støkkur Tóroddur inn á markið til okkurt, ið hevur substans, ið hann sum yrkjari kundi arbeitt nógv meiri við, heldur enn at skriva um ormar, køstaflugur, lort, spýggj og endurkomandi kavæl av banalitetum, ið hava lítið og einki poetiskt viðri mangan. Eisini hevur Tóroddur í hesum savninum eina endurnýggjandi disrespekt fyri føroyska mentunararvinum og søguni: *"Og tað var ikki/ soleiðis kærleikin sá/ mentunararvin/ skýggjast í søgurusti/ eingin vildi banka av."*

### Bókmentarák og sosiologi

Tóroddur hevur altíð hildið lítið um bókmentafrøði og um akademikarar, sjálvt um hesi er tey, ið skriva tey mest áhugaverdu verkini um t.d. yrking: *"Várið hoyrir at/ akademikararnir/ lesa skaldskapin/ við roknimaskinu og/ trillrundum tummastokki."* Soleiðis roynir Tóroddur at vera undan møguligum atfinningum, og skuldu tær komið, hevur hann longu svarað teimum — men tó er hetta fávitska á høgum støði.

Tað er eisini fávitskut at hugsa, at ikki eisini mentalívið í Føroyum er á tremur við vinatænastum. Pierre Bourdieu skrivaði eitt stórt verk um bókmentasosiologi, har hann serliga leggur seg eftir at kanna, hvussu kapping millum høvundar, bólkar av høvundum, kann fáa høvundar og ummælarar at hjálpa hvørjum øðrum. Í Føroyum hava ymisk bløð havt ummælarar frammi, ið m.a. hava ummælt Tóroddasa seinasta yrkingasavn *Royggj*, og tað er áhugavert at síggja, hvussu ymist fólk meta Tórodd sum yrkjara. Serliga Carl Johan Jensen á Fregnum hevur sett sær fyri at skriva eina langa verjuroðu fyri Tórodd sum yrkjara. Hesin er kendur fyri at sápla alt niður og norð, men tá tað kemur til Tóroddd, er hann trúgvur sum trøllið til at siga t.d.: *"Samanumtikið er Royggj eitt gott savn (...)"* Hetta tí hann: *"...í skjótt tjúgu ár viðgjørt føroyska samfelagið og føroyska mentan og mál í mun til samtíðina og tey kor hon setur."* Carl Johan er ikki samdur við t.d. undirritaða, at Tóroddur er løddur við speisemi, ella at hann er ein postmodernaður uppgevandi yrkjari. Eg haldi samanumtikið sum Niels Lyngsø, at Tóroddur hevur onkrar góðar reglur, men er so snerkjandi, at alt bert endar sum innskot, hissini álop, minningarstubbar, stuttlig orðaspæl og smáar og mangan banala umhugsan. Carl Johansa verjuroða roynir at seta Tórodd fram sum yrkjara merktan av surrealismu. Hetta seinasta er partvíst rætt, men bjargar fyri so vítt einki. Og um Tóroddur skrivar um føroyska mentan, ger ikki góðskuna størri. Hinvegin eru vit noydd at hava eitt ávíst tolsemi innan list, tí tað finnast ymiskar hevdir, ið eru púra ymiskar í orð og tal. Carl Johan er hinvegin trásettur av at niðurberja realismu, sum í sjálvum sær ikki er annað enn ein skriviháttur.

Eg haldi, at ein yrking eigur at skapa eitt klárt abstrakt mál, sum er sterkt og sansaligt, ið vendir sær til hugflogið. Lesarin skal merkja yrkingina bæði intellektuelt og holdsligt, og á henda hátt skal ein yrking skrivast í spenninginum millum ein eldhugaðan, østan og hugtiknan sang og eina ástøði, ið Søren Ulrik Thomsen helt fyri. Sangirnir hjá Tóroddi umboða ein ruðuleika, sum spælt av einum fullum hornorkestri í Albania. Hetta er mest sum at hoyra ein, ið er farin í barndømi, tosar við seg sjálvan og er mentalt um at fara av spónarlagnum. *Royggj* endar tí sum ov nógv goyggj til høgru og vinstru. Tóroddur ræðist, fyrr sum nú, útsýnið og sansin fyri heildarskaptum vakurleikasjónum og pathos.

*Tóroddur Poulsen: Royggj. Mentunargrunnur Studentafelagsins. 2002.*